VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Eldborg og frálandavinna

Nú um dagarnar gjørdist ikki bert føroyski flotin eitt stásiligt skip ríkari, eisini alt tað føroyska samfelagið gjørdist ríkari, tá fyrsta veitingarskip av sínum slag kom til landið. Eldborg hjá Justinussenmonnunum í Leirvík er enn eitt dømi um, at hóast allur heimurin er nervaður av kreppu og avleiðingunum av ragnarrokinum í altjóða fíggjarverðini, so eru tað tey, sum hava dirvi og treysti at gera nýggjar íløgur og ganga nýggjar leiðir.

Supply Service í Leirvík hevur bygt sítt fyrsta av trimum stórum veitingarskipum og er tað longu farið í drift, stutt eftir dópin í Havn fyri góðari viku síðani. Hetta eru tungvektarar av skipum, sum kosta góðar 250 mill. hvørt at byggja. Í løtuni verður so arbeitt við at fáa endaligu fíggingina uppá pláss til hini bæði skipini.

Nýggja flaggskipið í flotanum er eisini eitt áhugavert signal um, at føroyingar ikki bara hugsa um fisk. Við okkara geografisku beliggin-heit og við tí ótrúliga týdningarmikla tilfeingi vit hava í okkara sjófólki, so er tað so upplagt at leita aðrar vegir á sjónum, og her er frálandavinnan eitt sera gott høvi. Thorfólkini í Hósvík hava gingið undan í so máta og víst, at hetta er ein gongd leið. Thorskip og sjófólk arbeiða í dag á nærum øllum heimsins høvum, har tey veita tænastur til oljuvinnuna.

Tað er eisini hugaligt, at okkara fíggjarstovnar, í hesum føri EIK sær møguleikar í hesi vinnu og vil vísa teimum, sum hava initiativ og vilja, áhuga og ans. Vit eiga jú sum er tað so týðandi tilfeingi, sum skal til fyri at reka eina slíka vinnu, fólkini til at manna skipini. Áhugin hjá altjóða oljufeløgum fyri Føroyaøkinum er so eisini ein katalysator í hesi menning. Tá og um hesi feløg finna kolvetni í føroysku undirgrundini, tá verður stórur tørvur á tænastuveitingum frá eitt nú bæði Thor í Hósvík og Supply Service í Leirvík. Og meðan vit bíða til tann dagur upprennur, so troyta vit mongu møguleikarnar aðrastaðni og fáa harvið tað, sum er so eyðkent fyri føroyingar og føroyska vinnu, nevniliga royndirnar at arbeiða í hesi nýggju vinnu.

Tað skal vera okkara vón, at Eldborg fær góðan fong, tvs. góðar sáttmálar og at manning og eigarar fáa gott í beinið til at halda fram á hesi nýggju leið øllum tí føroyska samfelagnum til góða. Tillukku við Eldborg.

Sosialurin

Tað er so mangt sum er skomm

HELGI ABRAHAMSEN

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum sigur í samrøðu við Sosialin, at tað hevði verið skomm at biðið danir um at hækka blokkin aftur, og at hetta hevði verið eitt stig burtur frá sjálvberandi búskapi.

Eg hefti meg við orðini ”sjálvberandi búskapur.” Eg haldi at fólk hava fingið ta løgnu fatan, at ”sjálvberandi búskapur”, merkir tað saman sum ”eingin blokkstuðul úr Danmark”. Um vit taka allan blokkstuðulin burtur, og einki seta í staðin, og koyra við stóru halli, so verður tað kallað sjálvberandi búskapur.

Eg havi fylgt væl við politisku gongdini líka síðani fullveldislandsstýrið kom til valdið í 1998, men eg dugi als ikki at síggja, at føroyski búskapurin, ella almennu kassarnir eru meira sjálvberandi nú, enn teir vóru í 1998. Vit fáa minni inn í blokkstuðli, men vit koyra eisini við dundrandi halli.

Í 1998 varð sagt, at tað var skomm at lata onnur gjalda fyri okkum, tí tað skuldu vit gera sjálvi. Tað er í lagið, men nú vit skulu í holt við at gjalda sjálvi, nú vil eingin hava roknningina. Vit hoyra hetta dagliga í fjølmiðlunum: ”Tit mugu ikki taka nakað frá pensjónistunum”, ”tit mugu ikki lækka játtanina til tey lesandi”, ”nei til lønarsteðg”, ”fáa DIS'ararnir eina eykarokning, so ríma teir”, ”sjómannafrádrátturin má ikki nertast”, ”nei til tilfeingisrentu”, ”barnaverndarøkið má ikki nertast”, ”nei til at hækka skattin”, ”latið rentustuðulin fáa frið”, og eg kundi hildið fram. Eingin er tann rætti til at gjalda rokningina fyri niðurskurðin í blokkstuðlinum, men somu fólk siga, at tað er skomm at lata onnur gjalda fyri okkum. - Skal so eingin gjalda rokningina?

Onkur má gjalda

Tað er í finasta lagið, at politikarar siga, at tað er skomm at lata onnur gjalda fyri okkum. Men so mugu teir eisini tora at hyggja fólk inn í eyguni og siga við tey: Tit mugu gjalda!



Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.
Tel. 34 18 00
lysing@sosialurin.fo
Ring og fá ein prís!
Sosialurin

Innsent tilfar

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 09	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.